


*Líkt er til, at Todi í ár hevur sett ferð á frá fyrsta bríksli. Í øllum førum skeyt hann fyrsta málið hjá FCK í hesum kappingarárinum, tá teir byrjaðu kappingina við at hølva uppflytararnar úr Haderslev heili 5-1*

# Todi skoraði fyrsta málið

*Superligan: FCK var sera sannførandi í fyrstu royndini, og Óli Johannesen var ikki í hópinum hjá AGF*

Í vikuskiftinum fór fótbóltsurin av álvara á rull í Danmark. Øll liðini í bestu røðini spældu uttan Herfølge og AaB. Dysturin teirra millum í Herfølge verður ikki spældur fyrrenn í annaðkvøld. Orsøkin er tann, at AaB sunnudagin var í Italia og spældi í Intertoto Cup.

Mest óvæntaða úrslitið í fyrsta umfarinum kom longu leygardagin. Tá var AGF í Brøndby. Í øllum veddingarforsøgnum varð roknað við, at heimaliðið fór at vinna. Men tað var felagið hjá Óla Johannesen, sum fór við øll trimum stigunum.

AGF vann 2–1. Tað er sjálvandi hugaligt, men tað ger tað eisini sera torført hjá Óla Johannesen at stríða seg á liðið. Leygardagin var tað ikki pláss fyri føroyska landsliðsmanninum í sekstan manna hópinum, sum nýggi venjarin, Ove Christensen, hevði úttikið. Eftir sigurin á útivølli ímóti favorittunum úr Brøndby, kann tað ikki roknast við øðrum, enn at venjarin velur somu spælarar, tá Todi Jónsson og FCK sunnudagin koma til Aarhus.

**Todi fyrstur**

Fyrstu løtuna var nýggja liðið væl við, og trúføstu áskoðararnir hjá FCK – hesa ferð vóru teir 11.977 – vóru fjáltursstungnir. Teirra lið hevur so mangan lumpað teir. Haderslev misnýtti tíðliga stóran møguleika, og teir fingu eitt mál kolldømt fyri fríspark, men sum tíðin leið fekk heimaliðið gott tak á, og so var eingin at stúra. FCK sendi nýggja superligu liðið aftur til Suðurjyllands við 5–1 tapi. Gongdin síðsta tíman var orsøk til, at sigurin var sannførandi. Haderslev kendi seg trýst at gera mistøk, og FCK menninir vóru í góðum hýri.

Fyrrra umfarið var 37 minuttir gamalt, áðrenn FCK fekk hol á. Fyrsti málskjúttin hjá teimum í nýggja kappingarárinum var Todi Jónsson. Zuma spældi hann leysan, og Todi sendi málverjan burtur, áðrenn hann trillaði bóltin í kassan og var stórliga fagnaður.

Undan steðgin økti FCK, og tá teir beinanvegin í 2. hálvleiki komu upp á 3–0 var alt avgjørt. Venjarin spardi Toda síðsta korterið.

OB og Viborg spældu í gjárkvøldið, og Herfølge og AaB spæla í annaðkvøld. Tí er kanska nakað tíðliga at gera støðutalvuna upp, men tað er rættuliga sannlíkt, at FCK verður ovast eftir fyrsta umfarið.

Nýggi venjarin, Roy Hodgson, var væl nøgdur, men hann misti ikki fótafestið:

– Eg rokni ikki við, at eg kann siga nakað um vánirnar hjá liðnum at vinna DM fyrrenn á jólum, var tað, hann hevði at siga svongu tíðindafólkunum.

**Nýtt blóð**

Fyrsta royndin hjá FC Midtjylland í bestu deildini var framúr. Samansetta liðið av Herning og Ikast hevði vitjan av Lyngby, sum varð sent til hús við 4–0 tapi. Øll málini vórðu skoraði í 2. hálvleiki. Stóri maðurin var Mogens Laursen, sum eftir 20 minuttum í 2. hálvleiki gjørdi hattrikk.

Tað verður roknað við, at 19 ára gamli maðurin verður ikki gamal í donsku kappingini. Stórfeløgini kring Europa eru farin at vísa honum áhuga, og tað er ikki so undarligt. Í fjør var hann toppskjútti í næstbestu deildini. Tá umboðaði hann Randers Freja og skoraði 22 mál. FC Midtjylland keypti hann fyri 14 døgum síðani. Tá var hann burtur í summarfrí. Hann hevur bara vant saman við liðfeløgunum í eina viku, og nú er hann ivaleyst mest umrøddi spælarin í Danmark.

AB hevði í Gladsaxe vitjan av Silkeborg. Um tvær vikur skal B36 í Europa Cup spæla ímóti AB á sama vølli. Hesa ferð var heimaliðið nógv greitt omaná mest sum alla tíðina, men tríggjar minuttir undan leikloki klossaðu teir tvey stig burtur, tí tá javnaði Silkeborg til 1–1.

JH

# Helgi fær ikki spælt

*Gøtumenn komu til hús aftur í gjár, og teir eru væl nøgdir við venjingarleguna í Lemvig*

GÍ ferðalagið, sum hevur verið í Danmark í eina stóra viku, kom til hús aftur í gjár. Teir hava vant nógv, teir hava spælt tríggjar dystir, og teir eru væl nøgdir við ferðina. Hvat gagn teir hava fingið burturúr, fæst at síggja í landskappingini. Annan sunnudag skulu teir til Sumbiar, og so eiga teir B71 á heimavølli.

Umframt landskappingina hevur GÍ Europa Cup at hugsa um. Teir skulu spæla móti svenska Norköping, sum er vinarbýur hjá Klaksvík.

Johan Nielsen plagar at siga, at Europa Cup er eitt eyka upplivilsi, men hann hevur ongantíð roknað við, at føroysk lið fara at gera tær stóru skreytirnar har.

Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at GÍ venjarin ikki leggur nógv í at fyrireika seg til avbjóðingina. Mikukvøldið í síðstu viku var hann og hugdi at landskappingardysti millum Norköping og Trelleborg. Úrslitið var 0–0.

Fyri seks árum síðani var um reppið, at GÍ sendi Trelleborg úr Europa Cup. Men útskiftingarnar í fótbóltinum eru nógvar, og tað gongur skjótt. Av teimum, sum mikukvøldið mannaðu liðið hjá Trelleborg, var eingin við í 1994. Einasti maður, sum GÍ venjarin bar kenslu á, var liðleiðarin.

**Helgi skaddur**

Fyri vánirnar hjá GÍ í landskappingini og í Europa Cup er tað komið illa við, at Helgi Lamhauge Petersen ikki fær spælt. Hesar mánaðirnar, hann hevur verið í GÍ, hevur tað bara gingið rætta vegin, og fram móti summarsteðginum var Helgi ein tann týdningarmiklasti spælarin hjá GÍ. Men so fekk hann bruna í hælsinuna. Tað var akkurát so, at hann megnaði at vera við í steypafinaluni, har hann fekk reyða kortið, men so bar ikki til meiri.

Helgi var við í Danmark, men hann fekk ikki vant, og tað verður ikki roknað við honum nógvu tey fyrstu umførini í landskappingini, og tískil verður hann heldur ikki við í Europa Cup.

**Nýggja verju**

Danski Martin Thomsen fór niður aftur undan summarsteðginum. Tí hevur verið neyðugt hjá Johan Nielsen at finna fram til eina nýggja verju. Á Danmarkarferðini hevur Bartal Eliasen verið aftastur, og frammanfyri hann hava verið Poul Ennigarð, sum nú er komin heim aftur eftir skúlagongd í Danmark, og so Leivur Hansen, sum hevur staðið seg so væl, at hann tykist vera vorðin fastur maður á liðnum.

Jóan Petur Olsen hevur verið nógv skaddur undan summarsteðginum. Hann vandi í Danmark, og hann var við í tveimum av dystunum. Hann tykist vera komin so mikið fyri seg, at hann verður førur fyri at røkja miðvallarpláss eftir summarsteðgin.

**Dystirnir**

GÍ spældi tríggjar dystir í Danmark. Vit hava áður skrivað, at teir taptu 3–1 móti 2. deildarliðnum Holsterbro:

– Eitt púra óneyðugt tap. Vit vóru á odda í steðginum, vit høvdu spælt væl, og vit kundu havt verið frammanfyri við bæði tveimum og trimum málum. Fyrstu tíggju minuttirnar av 2. hálvleiki vóru vit orduliga føroyskir, sum vit plaga at siga. Teir fingu tvey bílig mál, og so var liðugt. Óli Hansen skoraði málið hjá okkum.

Hetta sigur Pauli Jarnskor. Móti danmarksseriuliðnum hjá Lemvig skoraði hann tvey mál. GÍ vann 3–1. Pauli javnaði til 1–1 beinleiðis upp á horna, og hann legði GÍ framum við brotssparki. Bartal Eliasen staðfesti sigurin. Í hesum dystinum hvíldu fleiri av føstu monnunum. Allir skiftisspælararnir fingu møguleikan frá fyrsta bríksli.

Ímóti danmarksseriuliðnum hjá Ikast vann GÍ 2–1. Hans Pauli Petersen og Bartal Eliasen skoraðu málini.

JH